# Aðalfundarfrágreiðing 2024 Eysturoyar Handverksmeistarafelag

Dagur: 3. apríl 2025
Tíð: 18.00 – 21.45 (døgurði frá kl. 18 – 19)
Stað: Bovling - Leirvík

Uppmøting: 18 limir og skrivari felagsins

Innkalling til aðalfundin bleiv send út 19. mars, og var tí lógliga fráboðaður sambært viðtøkunum.

Nevndin møtti nakað áðrenn fundin og skrivaði undir roknskapin. Áðrenn aðalfundin bjóðaði felagið uppmøttu limunum ein døgurða.

**Aðalfundurin**

Tikið varð undir við formanninum, um at fáa Símun Hammer sum orðstýrara og skrivara. Síðani fór fundurin fram eftir skránni sambært viðtøkum.

**Formansfrágreiðingin**

Formaðurin, Petur Frank Joensen greiddi frá virksemi felagsins síðan síðsta aðalfund. Víst verður til hesa frágreiðing.

Formaðurin segði eisini at nevndin í farna árið hevur tosað um, at felagið eigur at skipa fyri tiltøkum, sum taka støði í at lætta um gerandisdagin hjá limafyritøkunum. Formaðurin vísti á, at tað vildi verið gott, um limir felagsins komu við uppskotum um tiltøk. Onkur uppskot komu á sjálvum fundinum, men annars kann hetta gerast við, at venda sær til skrivstovuna umvegis simun@vrg.fo, tel. 566 600, ella við at boða onkrum av nevndarlimunum frá.

46 feløg eru limir í EyHMF, og er ynski altíð um at fáa fleiri limir við í felagið. Felagið hevur tó verið í einum vøkstri seinnu árini. Formaðurin segði við luttakararnar á aðalfundinum at teir vóru vælkomnir at bjóða fleiri fyritøkum í oynni at gerast limir. Mett er tó at uml. 80% av øllum handverkarafyritøkum í Eysturoynni eru limir.

**Roknskapur**

Ársroknskapurin vísti eitt úrslit á 53.796,84 kr. Útreiðslurnar áðrenn rentu og avskrivingar vóru 1.215.808,02 kr. Felagið valdið í 2023 ein nýggjan roknskaparhátt, har samlaða limagjaldið verður inntøkuført, og síðan verður tað frátrekt, sum fer til Føroya Handverksmeistarafelag.

Umsitingin í felagnum við bókhaldi og øðrum kostaði 108.639 kr. í 2024.

Ársroknskapurin varð áðrenn fundin góðkendur og váttaður av nevndini, og lagdur fram á aðalfundinum.

**Val av nevnd**

Eivind Hansen stóð fyri vali. Rúni Leitisstein, sum hevur verið í nevndini gjøgnum nógv ár, takkaði fyri seg, nú hann ikki hevur virksemið í Eysturoynni longur. 2 Valevnið stillaðu upp um plássið hjá Rúna Leitisstein – hesi vóru Urd Potts (KJ) og

# Aðalfundarfrágreiðing 2024 Eysturoyar Handverksmeistarafelag

Karstin Ejdesgaard (Stórbilar). Valið fór fram við skrivligari atkvøðugreiðslu. Tá avtornaði fingu Eivind Hansen og Urd Potts flest stemmur.

Eftir aðalfundin skipaði nevndi seg við Petur Frank sum formanni og Jóan Petur Vang sum næstformanni. Afturat teimum er nevndin nú mannað við Urd Potts, Eivind Hansen og Jóhan Hendrik Olsen.

Sum eykalimur bleiv Karsten Eidesgaard frá P/F Stórbilum afturvaldur, og nýggjur eykalimur er Jákup Olsen frá felagnum Hógv.

**Ymiskt**

Einki mál var komi inn undir 'Ymiskt', áðrenn freistina, ið er 8 dagar áðrenn aðalfundin. Tó varð víst á, at limir felagsins altíð hava møguleika fyri at koma við uppskotum til nevndin at arbeiða við. Eisini varð víst á fyrimunir við at vera limur, og til nýggju heimasíðu felagsins, www.eyhmf.fo.

Eftir fundin vóru 2 framløgur. Fyrst hevði Rodmundur Nielsen ein framløgu, har hann greiddi frá ætlanunum hjá Borg nú felagið hevur bygt nýtt á havnalagnum á Glyvrum. Eftir hann kom Ben Arabo vegna Framtak, og greiddi frá virkseminum hjá Framtak og hvussu Framtak arbeiðir tá íløgur verða gjørdar í feløg.

Fundurin var lokin kl. 21:30

Skrivað hevur, Símun Hammer

Petur Frank Joensen, fm

Jóan Petur Vang, nfm.

Jóhan Hendrik Olsen

Urd Potts

Eivind Hansen